Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 03.11.2023
Mál nr.: 23/20829
Málsviðgjørt: DH, BAB, JEK, JS, TM

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum (Broytingar í løgtingslógini um serligt avgjald á brennievni)

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
§ 1. Eitt gjald upp á 0,80 kr. pr. litur verður lagt á søluna av gassolju (viskositet við 38 stig C undir 200 sec. Redwood I) til brúkaran. Vøran er nevnd í Toll- og vøruskránni undir vørunumrum 2710.19.47 og 2710.19.48 fýringsolja, 2710.19.43 og 2710.19.46 autodieselolja. Somuleiðis verður eitt gjald upp á 0,10 kr. pr. litur lagt á søluna til brúkaran av brenniolju (fuelolju). Vøran er nevnd í Toll- og vøruskránni undir vørunumrum 2710.19.64 og 2710.19.68 brenniolja. *Stk. 2.* Gjaldið fyri olju selda í einum mánaði, skal verða goldið TAKS í seinasta lagi 22. í øðrum mánaðinum eftir. *Stk. 3.* Er avgjaldið ikki goldið, tá freistin er úti, skulu 0,7% roknast í rentu fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjalddegnum at rokna. Sama er galdandi fyri skuldskrivaða rentu. *Stk. 4.* TAKS kann innheinta við panting avgjøld og rentur, ið fallin eru til gjaldingar.	**§ 1.** Í 2024 verður eitt gjald upp á 0,80 kr. pr. litur lagt á søluna av gassolju, viskositet við 38 stig C undir 200 sec. Redwood I, til brúkaran. Vøran er nevnd í skjali 1, Toll- og vøruskráin, í løgtingslóg um toll undir vørunumrum 27101947 og 27101948 fýringsolja, 27101943 og 27101946 autodieselolja. Í 2025 og árini frameftir er gjaldið 1,00 kr. pr. litur. Í 2024 verður somuleiðis eitt gjald upp á 0,90 kr. pr. litur lagt á søluna til brúkaran av brenniolju, fuelolju. Vøran er nevnd í skjali 1, Toll- og vøruskráin, í løgtingslóg um toll undir vørunumrum 27101964 og 27101968 brenniolja. Í 2025 og árini frameftir er gjaldið 1,15 kr. pr. litur. *Stk. 2.* Gjaldið fyri olju selda í einum mánaði, skal verða goldið TAKS í seinasta lagi 22. í øðrum mánaðinum eftir. *Stk. 3.* Er avgjaldið ikki goldið, tá freistin er úti, skulu 0,7% roknast í rentu fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjalddegnum at rokna. Sama er galdandi fyri skuldskrivaða rentu. *Stk. 4.* TAKS kann innheinta við panting avgjøld og rentur, ið fallin eru til gjaldingar.

§ 2. Fyri gassolju latin til skip yvir 20 GT skal einki avgjald rindast. *Stk. 2.* Skip og bátar undir 20 GT, sum TAKS metir vera í vinnu og eru mvg-skrásett, hava rætt til at fáa endurrindað tað gjald, sum tey hava goldið sambært § 1. *Stk. 3.* Bjargingarbátar hjá sjálvbodnum bjargingarfeløgum, har øll arbeiðsmegin er sjálvboðin og óløn̈t, hava rætt til at fáa endurrindað tað avgjald, sum tey hava goldið sbrt. § 1. Tað er ein treyt, at hesir bjargingarbátar ikki verða brúktir til vinnuligt virksemi, tó eru gjøld fyri sleip, bjarging og aðrar smærri uppgávur undantikin. Umsókn um endurgjald skal sendast til TAKS. *Stk. 4.* Niðanfyri standandi meirvirðisgjaldsskrásettu virki: 1) Garðsyrki og plantuskúlar 2) Fiskaaling 3) Ídnaður 4) Gistingarhús 5) Vallaraheim 6) Framflutningsvirki hava rætt til at fáa endurútgoldið avgjaldið, sum tey hava goldið sambært § 1 av vørunummrunum: 2710.19.47, 2710.19.48 fýringsolja, og 2710.19.43, 2710.19.46 autodieselolja. *Stk. 5.* Landsstýrinum verður heimilað í kunngerð at áseta nærri reglur um, hvørji virki koma undir stk. 4 og um endurrindan av gjaldinum sambært hesi lóg.	**§ 2.** Fyri gassolju latin til skip yvir 20 GT skal einki avgjald rindast. *Stk. 2-5* verða strikað.